LM-067/2022

fylgiskjal 13.

Føroya Fuglafrøðifelag
Bøgøta 14, FO-100 Tórshavn
info@fuglar.fo
+298 223604

Tórshavn, 6. September 2021

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin)

Núverandi uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd má roknast sum ein niðurskerd útgáva av uppskotinum til ta náttúrumargfeldislóg (løgtingslóg um fyrisitingin av margfeldinum í náttúruni), ið var til viðgerðar í 2018/2019 (mál 17/00872-54).

Føroya Fuglafrøðifelag fegnast um endamálsorðingini í § 1. Tó eru nógvir bæði størri og smærri veikleikar í núverandi lógaruppskoti, sum forðar tí í at røkka hesari endamálsorðing, og sum ger, at náttúra og náttúruvirðir ikki fáa nóg góða lógarverju við hesum lógaruppskoti.

Yvirskipaðar viðmerkingar

Tað er eitt óskiljandi máttleyst lógaruppskot, ið her er lagt fram, sæð í mun til altjóða semjuna um, at vit standa í einari lívmargfeldiskreppu orsaka av nógvu sløgunum ella stovnunum, ið eru sera hótt, umframt at tey náttúrligu liviøkini hjá nógvum sløgum eru fyri stórari minking ella verða deild í smápettir, ið skapar eitt vána livigrundarlag. Heil náttúrusløg eru um at hvørva, eisini her í okkaru norðanøkjum.

Føroya Fuglafrøðifelag vil fyrst vísa á tríggjar stórar grundleggjandi veikleikar í lógaruppskotinum.

- Lógaruppskotið fevnir ikki um at vit, bæði sum tjóð og sum luttakarar í altjóða samfelagnum, burdu havt eina skyldu til at fáa til vega eitt vitanargrundarlag, ið ger okkum før fyri at heysta úr náttúruni á ein burðardyggan hátt. Hetta vitanargrundarlag skal byggja á skrásetingar og teljingar, so at vit kenna til stovnsstøddirnar og tískil kunnu fylgja menning teirra yvir tíð.
- Lógaruppskotið varðveitir núverandi skipanina við, at friðingarnevndir taka støðu um ávís mál viðvíkjandi náttúruávirkan, heldur enn at hetta verður lagt hjá einari sterkari náttúrufyrisiting. Hetta er ikki nøktandi, tí søgan hevur víst, at friðingarnevndirnar ikki eru eitt hóskandi fyrisitingarligt amboð, tá tað snýr seg um verju av náttúruvirðum.
- Lógaruppskotið setur eingi krøv til tíðarhóskandi frágreiðingar um avleiðingar, tá ið náttúruøki skulu byggjast út ella á annan hátt verða ávirkaði av virksemi í samfelagnum. Lógaruppskotið átti at rúma eina týðiliga neyvlýsing av, at ein frágreiðing av náttúruvirðum (jarðfrøði, náttursløg, plantur, fuglar, skordýr o.s.fr.) skal vera til taks, áðrenn útbyggingarætlanir verða góðkendar hjá almennum- ella ríkismyndugleikum. Í dag kemur tann lívfrøðiliga frágreiðingin alt ov seint inn í

Føroya Fuglafrøðifelag
Bøgøta 14, FO-100 Tórshavn
info@fuglar.fo
+298 223604

mannagongdina, tá ið flestu ætlanir longu eru góðkendar av myndugleikunum. Í hesum sambandi er tað ein stórur trupulleiki, at Føroyar ikki hava eitt samlað yvirlit yvir tjóðskaparligu náttúruvirðini, herundir øki og virðir, ið eru eindømi í tjóðskaparligum ella altjóða høpi.

Ítøkiligar viðmerkingar til greinir í lógaruppskotinum

§§ 3, nr. 1 og § 7, stk. 1, nr. 6 og kap. 3:
"Fremmand lívvera" er ein ógreið málbering. Tað hendir ikki sjálvdan, at sløg, ið *"ikki hoyrir til nakað slag ella nakran stovn, sum finst natúrliga á staðnum"* vitjar í Føroyum. Hetta serliga tá talan er um fuglar og firvaldar. Tað er tí sera týdningarmikið, bæði sum ein meginregla og í roynd og veru, at skilt verður ímillum *"innræsin sløg/lívvera"*, ið av ymsum orsøkum eru óynskt, og sløgum, ið bert vitja í Føroyum av tilvild. Skilt verður sum nú er ikki ímillum hesar báðar flokkar í orðagreiningini í lógini.

§ 3, nr. 4 og 5:
Her verður eisini nevnt *"ílegu"*, men arvafrøðiligt margfeldi og arvafrøðilig virði eru hareftir bert nevnt nærmast tilvildarliga í § 10 (Vard sløg) og § 18 (Økisvernd) í hesum lógaruppskoti. Altjóða verður stórur dentur lagdur á margfeldissáttmálan (eisini nevndur Rio-sáttmálin) og teir, sum komu eftir hann. Meðan undanfarna lógaruppskotið um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni frá 2018/2019 fevndi um ein kapittul um ílegutilfar (sum eisini kundi síggjast sum ein føroysk uppfylging av Nagoya-protokolluni), er hetta í stóran mun tikið burturúr hesum núverandi lógaruppskotinum.

§ 5:
Hendan lógargreinin er ógreið og leggur í stóran mun upp til, at náttúran fer at tapa eina og hvørja ósemju, har fíggjarlig áhugamál og/ella arbeiðspláss eru uppi í leikinum. Føroya Fuglafrøðifelag er av tí meining, at náttúran hevur eitt virði í sjálvum sær. Um ein lívvera doyr út, fáa vit hana aldrin aftur. Um eitt náttúruøki oyðilegst av útbygginum, fáa vit tað ikki aftur. Tað er eitt ómissandi virði, sum má roknast í einum gjaldoyra, ið ikki er peningur.

§ 6, stk. 1 og 2:
Her verður skrivað, at *"veiða og onnur tøka av djórum, som natúrliga liva vill, kann bara fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg"*. Tað er eingin neyvlýsing um, at *"veiða ella onnur tøka"* ikki skal hótta stovninum, hvørki her á leiðum ella í altjóða høpi. Harafturímóti er ein tílík neyvlýsing fyri plantur í §6, stk. 2. Tað er sera keðiligt, at (i) *"ikki hóttir stovnin"* ikki er nevnt fyri djór í § 6, stk. 1; (ii) at § 6 ikki fevnir um burðardygd; (iii) at orðingin *"hóttir"* ikki byggir á eitt vísindaligt vitanargrundarlag; og (iv) at djór, ið flyta seg burtur av landinum (fuglar, sjósúgdjór, fiskar), ið antin (a) fyrst og fremst hoyra til stovnar í øðrum londum, ella (b) stovnurin er deildur millum fleiri lond, teirra millum Føroyar, ikki er serstakt nevnt í hesi lógargrein. § 6 er ein tann mest týðandi lógargreinin í lógaruppskotinum, og tó er hendan lógargreinin óskiljandi máttleys.

§ 7, stk. 1:
Vit hava harafturat lagt til merkis at tey punkt, ið eru nevnd undir § 7, stk. 1 ikki fevna um veiðu av sløgum, sum meir ella minni siðbundin eru vorðin veidd í Føroyum. Hetta merkir, at fuglar bert eru

Føroya Fuglafrøðifelag
Bøgøta 14, FO-100 Tórshavn
info@fuglar.fo
+298 223604

fevndir av Fuglaveiðulógini, og fáa tí ikki tí eyka verjuna, ið Náttúruruverndarlógin kundi givið hesum stovnum.

Aðrar viðmerkingar

Átti "sbrt. løgtingslóg um náttúrufriðing" í § 6 í fuglaveiðulógini ikki at verða fylgisbroytt til "sbrt. løgtingslóg um náttúruvernd"?

Vegna Føroya Fuglafrøðifelag

Svein-Ole Mikalsen, formaður

Jón Aldará, næstformaður